# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## LOKALBRAK Í LIVERPOOL

Liverpool er komið aftur á sporið í Premier League, og Everton, sum var í botninum í fleiri vikur, hevur arbeitt seg nakað upp eftir stigatalvuni. Leygardagin bresta tey bæði fótbóltsliðini í Liverpool saman til eitt ordans lokalbrak.

**LIVERPOOL-EVERTON**
**PREMIER LEAGUE**
Leygardagin 6/2 kl. 12.45



## KOMIÐ SO, JENS MARNI OG JÓGVAN!

Í kvøld skulu bæði klaksvíkingurin Jógvan Hansen og kollfirðingurin Jens Marni Hansen taka lut í Grand Prix finalum í okkara grannalondum. Jógvan syngur í Íslandi og Jens Marni í Danmark. Spurningurin er so, um føroyingar fyri fyrstu ferð fáa ein luttakara við í europeisku kappingina

**DANSKT GRAND PRIX**
DR1 leygarkvøldið 6/2 kl. 19.00

**ÍSLENDSKT GRAND PRIX**
SvF leygarkvøldið 6/2 kl. 21.10



## ANNIKA AAKJÆR VIÐ TRÚBOÐARA

Við sínum eyðkenda reyða hári, sermerktu klæðum og frálíku rødd er hon eitt bland av eini discodrotning og einum hippie. Songkvinnan Annika Aakjær, sum hevur føroysk ættarbond, er klár við nýggjari fløgu, sum hon kallar Missionær. Í fjør fekk hon gjøgnumbrot í Danmark við fløguni Lille Filantrop, og hon var tilnevnd sum ársins talent á P3 Gull í ár.

**ANNIKA AAKJÆR**
Missionær
Mánadagin 8/2



## AVGERANDI LØTA HJÁ ANNU

Í kvøld verður gjørt av, hvørjir luttakarar sleppa í stóru live-sendingarnar hjá donsku X Factor kappingini. Anna Nygaard er ein av yngru luttakarunum, sum er eftir í kappingini. Fimm eru eftir í hennara bólki, og Remee skal velja trý til live-sendingarnar. Tað verður eitt trupult val, og spennandi verður at vita, um Anna kann sleppa við í stóruslignu live-sendingarnar.

**X FACTOR**
DR1 fríggjakvøldið 5/2 kl. 19.00



## HANUS Í HAVN

Hanus G. Johansen hevur havt framførslur til alskyns tiltøk í Føroyum og uttanlands. Hann hevur spælt á stórum konsertum, festivalum og á minni spælistøðum, og mikukvøldið kann hann upplivast í Sjónleikahúsinum í Havn. Hann hevur Magnus Johannesen og Mikael Blak afturat sær.
Hanus G. Johansen

**SJÓNLEIKARAHÚSIÐ Í HAVN**
Mikukvøldið 10/2 kl. 20.00



## MARKLUND VIÐ NÝGGJARI BÓK

Svenska krimidrotningin Liza Marklund hevur skrivað nýggja krimisøgu, og hesaferð hevur hon skrivað saman við kenda amerikanska rithøvundanum James Patterson. Teirra felags søga snýr seg um, at ung pør verða dripin á fríggjaferðum til europeiskar stórbýir. Ein svensk blaðkvinna og ein amerikanskur løgreglumaður hittast í Stockholm, hagar drápsmaðurin eftir øllum at døma fer at gera um seg.

Liza Marklund og James Patterson
**OSTKORTMORDENE**
Rosinante



## FÓTBÓLTUR FRÍGGJAKVØLD

Fótbóltur er at síggja í sjónvarpi mest sum alla vikuna. Men fríggjadagur er vanliga ein friðarligur fótbóltsdagur, men onkrir dystir verða nú spældir fríggjakvøld. Millum annað spæla týsk lið fríggjakvøld, og í næstbestu ensku fótbóltsdeildini eru onkrir dystir. Í kvøld er møguleiki at síggja oddaliðið í Championship, Newcastle, spæla ímóti Cardiff.

**NEWCASTLE-CARDIFF**
**FÓTBÓLTUR**
Fríggjakvøldið 5/2 kl. 19.45